## TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fimm stjørnur til Teit

**»The Singer« er uttan samanbering mest framsøkna, heilskapaða og væleydnaða útgávan hjá Teiti, skrivar danska Ekstrablaðið í ummæli av nýggjastu útgávuni hjá 30 ára gamla føroyinginum**



*Ummælarin hjá Ekstrablaðnum hálovar nýggjastu útgávuni hjá Teiti Lassen, The Singer*
*Mynd: Playground*

ÚTGÁVA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Talentið hevur ongantíð svitast, skrivar Ekstrablaðið, um nýggjastu útgávuna hjá Teiti Lassen, The Singer.

- Tulkingin av »Syner« hjá Nikolaj Nørlund og Peter Laugesen er eitt av teimum bestu sangavrikunum í hesari øldini. Við »The Singer«, har alt fellur upp á pláss, er Teitur av álvara flutturupp á tungvektsflokkin, skrivar blaðummælarin hjá Ekstrablaðnum, Henrik Queitsch.

- Heitið er ikki tilvildarligt, tí ljósa og sorgblíða røddin hjá Teiti er heilt frammi í tí fínu ljóðmyndini við eini perlurøð av undirspældum, men kortini detaljuríkum og gjøgnumhugsaðum arrangementi, sum er merkt av djúphugsaðum brúki av blásarum.

Tónleikurin er spældur inn í konsertsalinum á feriuhotellinum hjá vermóðurini í Gotlandi uttan fyri háárstíðina.

Hetta setir sín dám á útgávuna, sum er ein sertøk blanding av »nærmest endeløst rum og åndløst nærvær. På en gang teatralsk og fuldstændig nøgent. Mere ordrige kompositioner end traditionelle sange. Krystallisk smukt og uendelig vemodigt. Som at høre bladene falde af træerne, skrivar Ekstrablaðið, sum gevur Teiti Lassen fimm av seks møguligum stjørnum.

sansir.fo

## STARVSFÓLK TIL RADIODEILDINA HJÁ FT NET

### Søkt verður eftir starvsfólki til Radiodeildina hjá FT Net

Radiodeildin hjá FT Net hevur høvuðssæti hjá Føroya Tele í Hoyvík, men arbeiðið verður gjørt um alt landið. Nógv útgerð hjá FT Net stendur í náttúruvøkrum umráðum víða um landið, tí er starvið sermerkt á tann hátt, at tú arbeiðir við hátøkni, samstundis sum tú fært møguleikan fyri at vera nógv úti í náttúruni.

Vit kunna bjóða einum komandi starvsfelaga eitt arbeiðsumhvørvi við nógvum spennandi og fjølbroyttum tekniskum uppgávum, har góðir møguleikar eru fyri persónligum og fakligum avbjóðingum í einum mennandi umhvørvi.

**Starvsinnihald**
Sum starvsfólk á radiodeildini verður tú við til at menna og reka trádleysar skipanir í tøttum samstarvi við tínar starvsfelagar.

Arbeiðið fevnir um allar trádleysar skipanir, so sum:
- Mikrobylgju-linkar
- Trádleysu skipanirnar WiMAX og WiFi
- Sjónvarps- og útvarpssendinet
- Mastra- og antennuskipanir
- Fartelefonkervið GSM

**Førleikakrøv**
Vit ímynda okkum, at tú hevur viðkomandi tekniska útbúgving sum t.d. elektronikkmekanikari, elektronikkteknikari, diplom verkfrøðingur ella viðkomandi fakligar royndir.

Umframt hetta vænta vit, at tú ert:
- ágrýtin og hevur hug at taka við tekniskum avbjóðingum
- dugir væl at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur
- dugir væl at arbeiða við teldum og telduforritum
- ert væl fyri likamliga, sum t.d. at ganga í haganum, tá farið verður at arbeiða í radiosmáttum og mastrum

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett 1. apríl ella skjótast gjørligt. Lønin verður ásett samsvarandi royndum og útbúgving.

Fleir upplýsingar fáast hjá Jóhan Poulsen, leiðara á Radiodeildini tel 243649 ella á Starvsfólkadeildini á tel 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. februar 2008, og tær skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsrúm 27
110 Tórshavn
ella starvsfolkadeildin@ft.fo

Føroya Tele er ein fyritøka í stórum vøkstri, sum eftir fáum árum hevur ment seg til eina effektiva og nútímans fyritøku, ið er kappingarfør á øllum økjum. Vit hava sett okkum fyri at menna nýggjar tænastur og bjóða føroyska marknaðinum bestu tænastuna og nýggjastu tøknina. FT Samskifti er dótturfelag í samtakinum Føroya Tele. Í FT Samskifti starvast 100 fólk, og fyritøkan tekur sær av marknaðarføring, sølu, tænastu, kundarøkt og samskifti við privat- og vinnukundar hjá Føroya Tele.

FØROYA TELE